BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Verkætlanarstarvsfólk til vitanarsporið “Vitanarmenning og gransking” í Barnaverkætlanini

## Tvey avbjóðandi og spennandi størv sum ávikavist verkætlanarleiðari og –verkætlanarsamskipari, við granskingarførleikum, eru leys at søkja

**Um Barnaverkætlanina**
Hetta er ein einastandandi møguleiki at verða partur í eini nýskapandi tilgongd, sum hevur sum endamál at loysa avbjóðingar á barna- og ungdómsøkinum gjøgnum tvørgangandi samstarv og felags átøk, sum verða skipað og ment gjøgnum Barnaverkætlanina í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Samstarvið umfatar allar geirar og øki, sum hava við børn og ung at gera.

**Um vitanarsporið “Vitanarmenning og gransking”**
Vitanarsavnan og -menning verður skipað í einum serstøkum vitanarspori í Barnaverkætlanini, og verður framt í tøttum samstarvi við einum komandi depli fyri barna- og ungdómsgransking á Fróðskaparsetri Føroya. Hetta er tí ein partsverkætlan í heildarverkætlanini.

Endamálið er at skapa eina víðfevnda og nágreiniliga fatan av verandi viðurskiftum, avbjóðingum og møguleikum á barna- og ungdómsøkinum í Føroyum. Dentur verður lagdur á skipaða gransking og greining, sum røkkur frá kanningum av altjóða broytingartilgongdum til gjølla eftirmeting av núverandi føroyskari lóggávu og praksis. Samstarv verður við føroyskar og útlendskar serfrøðingar til tess at tryggja, at umskipanararbeiðið bæði byggir á próvfasta vitan og verður lagað til føroysk viðurskifti. Vitanarsporið fevnir í 2024-2025 um hesi høvuðsátøk:

1. “Baseline”: Grundkanna lívið og menningarkor hjá børnum og ungum
2. Kortleggja vitan um lívið og menningarkor hjá føroyskum børnum og ungum
3. Yvirlit yvir lóggávuna og tilmæli um lógarbroytingar
4. Yvirlit yvir rættindi hjá børnum og ungum og tilmæli um nýggjan rættindapolitikk
5. Samstarvsgreining og tilmæli um nýggjan bygnað, samstarv og netverk

**Ábyrgd og høvuðsuppgávur**

| Verkætlanarleiðarin – fulltíðarstarv | Verkætlanarsamskiparin - hálvtíðarstarv |
|---|---|
| Sum verkætlanar**leiðari** við granskingarførleikum hevur *tú ábyrgd* av at taka stig til at fyrireika, at fremja og eftirmeta granskingar- og greiningarátøk í vitanarsporinum. | Sum verkætlanar**samskipari** *luttekur* tú við tilvísing til verkætlanarleiðaran í vitanarsporinum í sambandi við nevndu uppgávur hjá verkætlanarleiðaranum |
| **Tín serstaka ábyrgd** er at menna eitt fullfíggjað yvirlit yvir ta vitan, sum er um barna- og ungdómsøkið í Føroyum. Yvirlitið skal skipast í eini frágreiðing, sum vísir, hvat vit vita um føroysk børn og ung. Eisini skal ein greiningarætlan mennast yvir data, sum enn ikki er skipað og greinað. | **Tín serstaka ábyrgd** er at sniðgeva og menna grundkanningina (“Baseline”), sum er at kanna trivnaðin og heilsustøðina hjá føroyskum børnum og ungum).<br>Kanningarskipanin skal setast í verk í seinnu helvt í 2024 og skal síðan fremjast annaðhvørt ár. |
| Arbeiðið skal mennast saman við einum komandi depli fyri barna- og ungdómsgransking á Fróðskaparsetri Føroya. Staðsetingin er í | Kanningarskipanin skal mennast saman við einum komandi depli fyri barna- og ungdómsgransking á Fróðskaparsetri Føroya. |

| | |
|---|---|
| hølunum hjá Barnaverkætlanini í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. | Staðsetingin er í hølunum hjá Barnaverkætlanini í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. |

**Førleikar**

| Verkætlanarleiðarin | Verkætlanarsamskiparin |
|---|---|
| Umsøkjarin skal í minsta lagi hava hægri útbúgving á kandidat ella masterstigi. Hagfrøðingur, KT verkfrøðingur ella líknandi. Umsøkjarin skal kunna samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum, umframt at kunna samstarva í einum breiðum toymi umboðandi fleiri fakøki. | Umsøkjarin skal í minsta lagi hava hægri útbúgving á kandidat ella masterstigi. Fólkaheilsufrøðingur, hagfrøðingur ella líknandi Umsøkjarin skal kunna samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum, umframt at kunna samstarva í einum breiðum toymi umboðandi fleiri fakøki. |
| Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur:<br>• Kunnleika til at innsavna og vísa data/vitan í databasum<br>• royndir við arbeiði við stórum og ymiskum datasettum<br>• granskingar- ella kanningarroyndir<br>• góðar førleikar at nýta forrit til greiningar av stórum datasettum<br>• góðar hagfrøðiligar førleikar<br>• góð samskiftis- og samstarvsevni<br>• Leiðslu- /verkætlanarleiðsluroyndir | Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur:<br>• kunnleika til/og ella royndir við kvantitativari gransking<br>• royndir við spurnarkanningum og stórum datasettum<br>• granskingarroyndir- og kanningarroyndir<br>• góðar førleikar at nýta forrit til greiningar av stórum datasettum<br>• góðar hagfrøðiligar førleikar<br>• góð samskiftis- og samstarvsevni |

## Vit bjóða tykkum

Leiðandi og samskipandi leiklut í vitanarsporinum “Vitanarmenning og gransking”, sum er eitt av teimum fýra menningarsporunum í Barnaverkætlanini. Í samstarvi við verkætlanartoymið fyri Barnaverkætlanina skulu tit tryggja, at málini í vitanarsporinum verða rokkin, og harvið vera við til at fáa samlaðu verkætlanina at røkka sínum málum.

## Setanar- og lønartreytir

Bæði størvini eru tíðaravmarkað til **30. juni. 2025**, við góðum møguleikum fyri at leingja setanina antin í Barna- og útbúgvingarmálaránum ella á Fróðskaparsetrinum treytað av fígging. Framhaldandi gransking á ph.d.-støði ella post-doc kann møguliga knýtast at størvunum.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarmyndugleikin er Barna- og útbúgvingarmálaráðið, sum hýsir verkætlanini í Smæruni.

Størvini hava tilvísing til Barna- og útbúgvingarmálaráðið (starvsfólkaábyrgd), Barnaverkætlanina (uppgávuábyrgd) og framtakseindina á setrinum (granskingarábyrgd). Miðað verður ímóti, at størvini verða sett tann **1. november 2024**.

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið**

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum, skal sendast til:

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøtu 7,
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við telduposti til: bumr@bumr.fo

Umsóknin skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 7. oktober 2024.** Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Steinbjørn Hardlei, verkætlanarleiðara fyri Barnaverkætlanini, á tlf. 512166, ella t-post shardlei@bumr.fo. Áhugað kunnu lesa meira um Barnaverkætlanina á heimasíðu ráðsins bumr.fo

***Barnaverkætlanin*** *er ein nýskapandi tilgongd, har endamálið er at loysa avbjóðingar á barna- og ungdómsøkinum gjøgnum tvørgangandi samstarv og felags átøk, sum verða skipað og ment gjøgnum Barnaverkætlanina í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Breið politisk semja er millum Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Løgmálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið um at virka í felag fyri at laga niður forðingar, sum kunnu verða millum ymsu skipanirnar og geirarnar, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur og tilboð til børn og ung. Í Barnaverkætlanini er ein yvirskipaður verkætlanarbólkur við einum leiðara, samskipara og fakligum ráðgeva. Barnaverkætlanin er skipað í fýra ymsum veitingarsporum: #1 Verkætlanarleiðsla- og skipan, #2 Pilotverkætlanir, #3 Strategi- og førleikamenning og #4 Vitanarmenning og gransking.*